GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Sunny 2.0D LX
St. Car
gráur, 5 hurðar,
45.000

Nissan Almera 2.0d GX
grønur, 5 hurðar,
árg. 1997, 75.000 km.
110.000

Nissan Primera 2.0d SLX
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1992, 167.000 km.
65.000

Nissan King Cab 2500
diesel, 4x4,
grønur, 2 hurðar, árg. 1996,
120.000

Peugeot 405 GTX 1.9
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 70.000 km.
50.000

Ford Courier Van
reyður, 3 hurðar,
árg. 1996, 41.000 km.
65.000

Mitsubishi Lancer
vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1989, 222.000 km.
28.000

Opel Astra 1,6
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 74.000 km.
75.000

Opel Astra 1,6 8V, Comfort
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1998,
119.000

Opel Astra Van
árg. 1995,
65.000

Opel Kadett 1,6
gráur, 5 hurðar,
árg. 1987, 168.000 km.
15.000

Peugeot 406 ST 2,0
vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1996, 63.000 km.
125.000

Peugeot 605 2.1TD AUT.
bláur, 4 hurðar,
árg. 1994,
145.000

Toyota Carina 1.6
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1995, 103.000 km.
96.000

Toyota Corolla 1,3 Galla
reyður, 3 hurðar
árg. 1995, 99.000 km.
83.000

VW Golf Turbo Diesel
vínreyður, 3 hurðar
árg. 1994, 200.000 km.
90.000

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin

GEVIÐ BLÓÐ

Fólk til Marknaðardeildina

Atlantic Airways sóknast eftir einum starvsfólki til marknaðarføring og sølu.

Atlantic Airways er eitt flogfelag í støðugum vøkstri, og fær marknaðardeildin tískil alsamt fleiri uppgávur at taka sær av. Soleiðis skalt tú millum annað verða við til at fyrireika og marknaðarføra støðugt fleiri nýggj ferðatilboð til okkara viðskiftafólk.

Tú hevur góð skapandi evnir, og tú dugir at loysa skiftandi og fjølbroyttar uppgávur. Harumframt hevur tú kunnleika til marknaðarføring og sølu. Tú ert ein royndur brúkari av Amadeus og øllum teimum vanligu telduforritunum og hevur góðan málkunnleika. Í sambandi við arbeiði kemur tú eisini at ferðast uttanlands.

Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum. Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli, og starvið verður sett skjótast gjørligt.

Lønin verður eftir avtalu.

Upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kent Christensen á tlf. 34 10 40.

Atlantic Airways
Sølu- og Marknaðardeildin
FO-380 Sørvágur

ATLANTIC AIRWAYS
Tel: 34 10 40 · Fax 34 10 01
www.atlantic.fo

Starvsfólk til kaffistovuna í Føroyahúsinum

Kaffistovan í Føroyahúsinum er miðdepilin í húsinum, hagar fólk koma at hitta onnur, á fund, at lesa blað, lána bøkur og at keypa sær ein drekkamunn við einum góðum bita afturvið. Javnan eru eisini veitslur, brúdleyp og onnur tiltøk at taka sær av.

Førleiki tín:
Søkt verður eftir einum fólki, kvinna ella maður, sum serstakliga kann vera við til at skapa eina nýtímans, livandi og hugnaliga føroyska kaffistovu í Keypmannahavn. Tí er neyðugt at tú:

- hevur áhuga fyri vælferð og trivnað hjá gestunum
- er kreativ/ur, ágrýtin og fryntlig/ur
- er hugað/ur at samstarva við øðrum fólki og sjálvbodnum í húsinum
- kanst laga teg eftir skiftandi arbeiðstíðum
- dugir at orða teg í talu og skrivt á føroyskum og donskum eins og at fáast við tøl og tilboð
- dugir at keypa eins væl og at selja vørur og tænastur
- hevur hug og hegni til matgerð og borðreiðing

Vit kunna bjóða tær:
- spennandi og avbjóðandi starv, har tú kanst seta tín egna dám á arbeiðslag og umhvørvið
- eitt arbeiðspláss, har tú hittir nógvar landsmenn
- góð arbeiðskor og løn eftir førleika
- avtalu um frítíð og smáskeið

Upplýsingar um starvið kunna fáast hjá leiðaranum í húsinum. Umsókn verður send til Føroyahúsið í Keypmannahavn, Vesterbrogade 17A, 1620 København V. Umsóknarfreistin er 25. juli.

Føroyahúsið í Keypmannahavn

GRAVSTEINAR OG KANTSTEINAR.
NÚ EISINI ÚR FØROYSKUM GRÓTI

Til útisetar í Danmark
Vit kunnu seta gravsteinar upp í Danmark uttan eyka kostnað

Prísir við litmyndum verða sendir kring landið og til úttlandið

Skjót leveringg

Danstein
Tel. 318323
Tel. 447512
Tel. 217512
Fax 449961
www.danstein.fo
RUNAVÍK - R. C. EFFERSØESGØTA 19, TÓRSHAVN

Sosialurin - 311820

FARTELEFONIR
GSM - NMT 450
Tráðleysar telefonir o. a.
Ymisk merki, so sum:
MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA
CONNECTING PEOPLE
SIEMENS
BENEFON
SØLA & TÆNASTA
Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045

Feriuavloysari

Søkt verður eftir feriuavloysara til skrivstovuna í Keypssamtøkuni í Hoyvík, at byrja beinanvegin, ella skjótast tilber.

Tað er ein fyrimunur, men eingin treyt, um viðkomandi hevur royndir innan fyri skrivstovuøki.

Talan er um fulltíðarstarv og roknast kann við, at avloysaratíðin er umleið 3 mánaðar. Løn sambært S&K.

Meira fæst at vita um starvið hjá Finn Nielsen, tlf. 314149.

Umsókn skal sendast til FK Hoyvík, Box 349, 188 Hoyvík.

Keypssamtøkan í Hoyvík

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650

Uppsetan og skipan av barrum
Til:
Brúdleyp
Rundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Ársveitslur
Reseptiónir
og tillíkt
Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo
Sosialurin 311820

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

Trainee hjá

Kloosterboer Terminal Faroe Islands

Hevur tú hug at royna teg í altjóða høpi?

Í samstarvi við Føroya Handilsskúla og SIEC Føroyar, bjóða vit einum næmingi, sum hevur tikið HH ella FHS prógv í ár, at starvast hjá okkum sum trainee í uml. 1 ár. Endamálið við hesi skipan er, at næmingurin skal nema sær kunnleika um, hvussu tað er at arbeiða á einum virki í altjóða høpi.

Vit bjóða tær:
- At arbeiða í einum altjóða umhvørvi.
- At royna í veruleikanum tað tú hevur lært á handilsskúlanum.
- At nema kunnleika um logistikk.

Vit vænta av tær:
- At tú hevur HH ella FHS prógv
- Ert fyrikomandi
- Dugir enskt í skrift og talu
- Ert nærløgd/ur
- At tú kanst arbeiða uttanlands, tá tørvur er á tí.

Fleiri upplýsingar um starvið kunna fáast við at ringja til Kloosterboer Terminal Faroe Islands tel 477777 og tosa við Bárð Nielsen.
Umsókn við prógvum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 9. juli 2001

Kloosterboer Terminal Faroe Islands
Kollafjørður

Kloosterboer Terminal Faroe Islands er eitt frystihotell, har goymdar verða frysti- og kølivørur. Harumframt verður skipað fyri flutningi um allan heim. Vit eru við í Kloosterboer Group, sum hevur frystihotell í fleiri londum, umframt eitt altjóða flutningsnet.

www.kloosterboer.fo

tbsmf5 • 31 65 11

Stjóri til fiskavirki

Søkt verður eftir stjóra til fiskavirkið P/f. Vaðhorn Seafood á Strondum.

Tað er ein fyrimunur, at umsøkjarar hava leiðsluroyndir og holla vitan um fiskaframleiðslu.

Fyri tann rætta persónin kunnu vit bjóða eitt áhugavert og avbjóðandi starv, har tú, saman við dugnaligum starvsfólkum kanst vera við til at menna eitt gott arbeiðspláss.

Vit vænta at tú:

- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur áhuga í at skapa úrslit

Løn verður ásett eftir nærri avtalu.

Umsóknir skulu sendast til Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, áðrenn 16. juli 2001, har eisini meir fæst at vita um starvið.

Sp/f Grannskoðarastovan á Skála
Eyðbjørg Thorleifsson · Páll Højgaard
Civiløkonomar og skrásettir grannskoðarar FRR
Tlf. 441666 · 480 Skála

Keyp myndir

Nú er møguleiki at keypa myndir sum standa í Sosialinum

Kostnaður pr. stk. fyri litmynd:

10x15 cm. kr.	80,-	18x24 cm. kr.	150,-
13x18 cm. kr.	100,-	20x30 cm. kr.	200,-
15x21 cm. kr.	130,-	30x45 cm. kr.	350,-

Fyll henda lepan út.
Klipp myndina út og send hana saman við lepanum til Sosialin.

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Blað nr.: _____
Síða: _____
Stødd: _____
Mongd: _____

Navn: _____
Bústaður: _____
_____
Telefon: _____